VÍF-StÍF 30-23 (16-13):

# VÍF tendraði

**VÍF spældi sum eitt veruligt oddalið, tá teir sunnudagin góvu meistarunum av Skála bank**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nógv hevur verið tosað og skrivað um óvanliga tungu gongdina, sum mansliðið hjá VÍF hevur havt higartil í ár.Ein gongd, sum eitt skifti viðførdi, at liðið næstan varð parturr av botnstríðnum, og tó at nakað av vend síðani er komið í, so er enn eitt petti upp til ovastu liðini.



*Eli Müller stóð einki minni enn ein branddyst í málinum hjá VÍF, og í longum løtum mundu strandingar ivast í, hvør tað yvirhøvur skuldi bera til at skora móti honum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Áki gjørdi góðan mun

Tí var einki at ivast í, hvar trýstið lá undan dystinum sunnudagin. Tó at talan framvegis bert er um grundspælið, so hava vestmenningarnir ikki ráð at missa nakað serligt afturat, um teir sum vant skulu hava eitt stórt orð at siga í oddastríðnum í deildini.

Og so kann leggjast afturat, at tað hava teir framvegis. VÍF ikki bara vann dystin móti StÍF. Til tíðir líktist tað eini framsýning í skjótum og effektivum hondbóltsspæli, har meistararnir so dyggiliga vórðu settur upp á pláss av einum sera væl uppløgdum heimaliði.

Tað tók kanska eitt lítið sindur av tíð, áðrenn heimaliðið veruliga kom fyri seg. Byrjanin upp á dystin var kanska av tí heldur meira varliga slagnum. Liðini fylgdust sear pent, og kanska var tað enntá soleiðis, at gestirnir høvdu eina lítla yvirvág.

Okkurt suffið mundi eisini vera at hoyra í høllini, tá strandingarnir brádliga smoygdu seg tvey mál framum, men so raknaðu vestmenningarnir við.

Stóra broytingin mundi vera, at venjararnir gjørdu av at royna seg við bæði Inga Olsen og Áka G. Olsen á bakplássunum. Her hevur tað aloftast verið so, at Áki – hóast sínar stóru leikligu dygdir – hevur verið eitt slag av back-up fyri fyrst og fremst Inga, men eisini teir báðar stóru bakkarnar, men tað var heilt greitt, at tað kom munandi meira ferð á, nú bæði hann og Ingi vóru á vøllinum. Álopsspælið koyrdi kvikliga frá síðu til síðu, inn á strikuna, og var eingin onnur loysn í eygsjón, so duga teir báðir so sanniliga eisini at skjóta móti málinum.

Og eisini í verjupartinum høvdu vestmenningar takið. Ikki minst Eli Müller, sum nýtti høvið til at spæla sín besta dyst á árinum, tó at sterka verjan sjálvandi eisini hjálpti til í hesum.

### Framsýning

Stóri spurningurin í steðginum var, hvørt VÍF megnaði at halda fast um takið, sum teir nú høvdu á dystinum, ella um teir eins og onkra tíð áður, nú fóru at tveita alt burtur.

Og svarið kom mest sum alt fyri eitt. VÍF sat framvegis eins tungt á dystinum, og líka mikið, hvussu strandingarnir royndu, so fingu teir ikki eitt bein til jørðina. Eftir tíggju minuttum hevði heimaliðið skotið seks mál móti tveimum hjá gestunum, og tá gestirnir so heldur ikki megnaðu at gera sær dælt av eini seks-móti-fýra støðu, mundi skriftin standa heilt týðiliga á vegginum. Vestmenningarnir tóktust í øllum førum ikki sansa, at teir við hesum skuldu verið munandi skerdir, men hildu tvørturímóti á við at skræða mótstøðuverjuna sundur. Serstakliga gjørdu Ingi og Sámal um seg, men teir fingu so sanniliga góða hjálp frá liðfeløgunum, sum alla tíðina royndu at gera sítt, soleiðis at skjúttarnir á liðnum fingu rúm og tíð at greiða sínar skyldur.

### Tættari

Nóg mikið til ein oddasess á stigatalvuni, var sigurin hjá VÍF ikki, men í øllum førum fer tað alt meira at líkjast tí, sum vestmenningar eru vanir við. Fyri framman stendur eisini ein dystur móti oddaliðnum, Kyndli, og megnar VÍF eisini at vinna hendan, so fer at gerast heilt tætt frammi í oddinum.

Og mett eftir spælinum sunnudagin, so er einki at ivast í, at VÍF hevur møguleikan móti Kyndli. Stríðsandi og offurvilji hevur annars verið nakað, sum hevur eyðkent Kyndil í ár, og nakra læta uppgáva fær VÍF so undir ongum umstøðum. Men sami striðsandi og sami offurvilji tykist nú eisini vera at síggja hjá teimum gulu, og megna teir at halda fast um hetta, so skal í øllum førum hampuliga nógv til, áðrenn teir koppa.

Hjá strandingunum var tað sjálvandi ein herskin biti, at teir soleiðis skuldu fáa av at vita, men dysturin sýndi um ikki annað, at teir so avgjørt hava sínar lutir at arbeiða við. Ikki minst í álopspartinum, sum í løtum tykist koyra heldur tungt. Serstakliga verða stórir byrðar lagdir á Svein og Mihai, og tá hesir so ikki megna at lyfta, hevur liðið ein trupulleika. Hvørt hesin verður loystur til komandi uppgávurnar, er ilt at meta um, men um ikki annað, so kunnu strandingarnir fegnast um, at teir í løtuni eru liðið, sum hevur léttastu dystirnar á pappírinum, nú fyrst H71 og síðani KÍF standa fyri tørni.



*Ingi Olsen og hansara menn vóru flúgvandi sunnudagin. Líka mikið, hvussu strandingarnir royndu at stríðast, so megnaðu teir als ikki at halda VÍF, sum til tíðir tóktist halda eina hondbóltsframsýning móti meistarunum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Dysturin í tølum

**VÍF-StÍF 30-23 (16-13)**
**Málskjúttar**
**VÍF**: Ingi Olsen 11(5), Agnar Joensen 6(1), Sámal Joensen 4(1), John Zachariasen 4, Harald Bjørgvin 2, Piti Negru 2, Áki G. Olsen 1
**StÍF:** Arthur Johansen 8(6), Andre F. Danielsen 6, Mihai Marinescu 3, Bent Djurhuus 2, Sveinur Justinussen 2, Mortan Hansen 1, Alexandur Johansen 1
**Brotskøst:** VÍF 8, StÍF 8
**Útvísingar:** VÍF 8, StÍF 2
**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Uni Wardum. Høvdu so sanniliga sítt at síggja til, men hóast ónøgdin onkra tíðina var heilt stór, so mundi heildarmetingin tó vera á eini góðari leið frá báðum pørtum.



H71-Neistin 24-26 (11-13):

# Neistin heldur fast

**Í eini tættari grannauppgerð eydnaðist bláa høvuðsstaðarfelagnum at ogna sær bæði stigini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast hoyvíkingar heldur ikki í ár tykjast skula leggja seg út í oddastríðið, so duga teir framvegis at arga fremstu liðini í deildini. Ikki minst, tá talan er um dystir móti hinum havnarliðnum. Fyrr í heyst gjørdust teir einasta liðið, sum hevur bast Kyndli, og sunnudagin var um reppið, at teir eisini stjólu stig frá Neistanum.

### Mundu tveitt burtur

Tað var annars ikki so leingi nakað, sum bendi á, at Neistin skuldi fáa trupulleikar av dystinum sunnudagin. Eftir eina byrjan, har millum lítið og einki hekk saman hjá liðnum, fingu teir bláu veruliga glið á spælið, og longu undan steðginum høvdu teir fingið hoyvíkingarnar aftur og eisini lagt seg framum.

Og eftir steðgin helt Neistin bara fram. Um miðjan hálvleikin vóru fimm mál á muni, og so hvørt, sum minuttirnir gingu, tóktist ein trivaligur sigur alt meira sannlíkur. Men seinastu løtuna steðgaði alt aftur upp. Neistin skoraði til 23-17 sjey minuttir undan leikloki, men so settu teir á heimaliðnum á. Fýra mál á rað fingu aftur nakað av spenningi í dystin, og hevði hesin spurturin komið fáar minuttir áðrenn, so kundi Neistin verið komið í heilt álvarsligar trupulleikar.

Men eftirverandi tíðin var ov knøpp, og hóast H71 aftur fekk tvey mál seinasta minuttin av dystinum, so var tað ov lítið.

Við sigrinum leyp Neistin upp á næstfremsta plássið í deildini, har teir eru eitt stig aftan fyri Kyndil. Komandi dysturin hjá teimum bláu verður aftur í Hoyvikarhøllini, tá teir vitja KÍF, og so verður grannauppgerðin og oddabrakið á skránni, tá Kyndil tekur ímóti.

Hoyvíkingar skulu næsta vikuskiftið royna seg á Skála, og tað líkist í øllum førum einari truplari uppgávu.

### Dysturin í tølum

**H71-Neistin 24-26 (11-13)**
**Málskjúttar**
**H71:** Halgir Dahl Olesen 7, Johnny Durhuus 5, Henrik Gerster 4(2), Tróndur Vatnhamar 3, Heindi Bendtsen 2, Esbern Patursson 2, Niels Viggo Niclasen 1
**Neistin:** Blagoje Buha 9(2), Dragisa Stojovic 7, Ragnar Satkksund 3, Dann Thorleifsson 2, Áki Mørk 2, Helgi Justinussen 2, Karl Oddmar Rasmussen 1
**Brotskøst:** H71 2, Neistin 2
**Útvísingar:** H71 3, Neistin 2
**Dómarar úr Kyndli:** Geir Wardum & Eyðun Samuelsen

StIF-Neistn 20-21 (13-18):

# Trý mál var nokk

**Hóast Neistin bert fekk eitt mál í 28 minuttir, so megnaðu tær at enda at fáa sigurin til høldar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir fyrra hálvleik í dystinum á Strondum millum StÍF og Neistan, vóru ikki stórvegis ábendingar um, at hetta skuldi gerast ein av teimum heilt spennandi dystunum. Neistin og Simona Dziugyte tóktust snøgt sagt vera alt ov væl fyri til StÍF, sum framvegis má klára seg uttan Alinu Olaru.

Gestirinir lupu avstað alt fyri eitt, og eftir at hava skapt sær eina hampuliga leiðslu, skuldu tær so bara halda fast um hesa.

Og hetta sá sum so út til at rigga fínt, men í seinna hálvleiki gekk galið. Hvussu tær so enn royndu, so eydnaðist teimum ikki at fáa bóltin í kassan, og alt meira fór hetta at líkjast einum stórum kompleksi hjá liðnum. Simona varð sjálvandi væl ansað, men heldur ikki av brotsteigarblettinum megnaði hon at fáa bóltin í kassan, og spakuliga tók StÍF seg meira fram.

Neistin megnaði ikki at skjóta mál í samfullar 22 minuttir eftir steðgin, men heldur ikki málið, sum loksins kom, tóktist lata upp fyri nøkrum. StÍF fór at enda eisini framum, men so raknaði Neistin brádliga við. Við teimum báðum seinastu málunum í dystinum fingu tær kortini koppað øllum til sín fyrimuns, og so kundi tær fagnast, meðan vertirnir bara máttu ásanna, at alt stríðið hevði verið til fánýtis.

Og spurningurin er so, hvussu liðini nú munnu vera fyri til komandi avbjóðingarnar. Hjá Neistanum er í øllum førum greitt, at tær eisini mugu læra seg at liva uttan Simonu Dziugyte, tá málslúkurin verður tikin úr spælinum. Tað megnar liðið í alt ov lítlan mun, sum er, og so er spurningurin, hvørt ein loysn er funnin á hesum undan komandi dystinum móti Stjørnuni.

StÍF hevur í fleiri førum sýnt, at moralurin á liðnum er sera góður, men spurningurin er, hvørt hetta aftur í ár røkkur til heiðursmerki. Ein ábending um hetta fæst kanska sunnudagin, tá tær taka móti meistarunum úr VB.

### Dysturin í tølum

**StÍF-Neistin 20-21 (13-18)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Milica Ergic 6, Poula D. Olsen 6, Sunfríð B. Jacobsen 2, Paula B. Høgnesen 2(1), Anna Maria Berthelsen 2, Beinta Jacobsen 1, Anna B. Danielsen 1
**Neistin:** Simona Dziugyte 9(2), Rakul Augustinussen 5, Unn Kragesteen 2, Lív Sørensen 1, Marjun Tróndarson 1, Vivian Unadóttir 1, Lina Andriulyte 1, Susan Brockie 1(1)
**Brotskøst:** StÍF 2, Neistin 6
**Útvísingar:** StÍF 3, Neistin 1
**Dómarar úr H71:** Jákup Símun Simonsen & Høgni M. Joensen

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Neistin | 78 (17) |
| Ioana Rápa | VÍF | 53 (12) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 53 (16) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 47 (16) |
| Milica Ergic | StÍF | 45 (7) |
| Nicoleta Radu | Søljan | 44 (7) |
| Gurið Mortensen | VB | 41 (6) |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 39 |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 38 (5) |
| Katarina Stepanovic | Stjørnan | 37 (10) |
| Rannvá Augustinussen | VB | 33 |
| Ann Mari Vang | Kyndil | 33 (3) |
| Poula D. Olsen | StÍF | 31 |
| Irina Rodevici | VÍF | 31 |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 31 (2) |

**Menn**

| | | |
|---|---|---|
| Blagoje Buha | Neistin | 58 (16) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 55 (6) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 53 (22) |
| Dragisa Stojovic | Neistin | 50 (2) |
| Ingi Olsen | VÍF | 44 (18) |
| Sámal Joensen | VÍF | 36 (5) |
| Damir Oros | KÍF | 36 (13) |
| Henrik Gerster | H71 | 35 (12) |
| Áki Mørk | Neistin | 34 (3) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 33 |
| Høgni Klein | Kyndil | 33 |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 32 (4) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 31 |
| Janus Einar Sørensen | Kyndil | 31 (3) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 29 (14) |

# Tungt hjá Heina

Heini Hanusarson fekk trý mál, men tað var ikki nóg mikið hjá Team Midtsjælland, tá teir um vikuskiftið royndu seg ímóti Team Helsinge í bestu donsku hondbóltsdeildini.

Endaliga úrslitið av dystinum var 30-25 til Helsinge, sum við hesum stríddi seg upp um TMS á stigatalvuni, tó at tað bert er málmunurin, sum ger hetta av. Høvdu Heini og teir vunnið dystin, hevði stigatalvan helst sæð nakað ljósari út, men har er so ikki stórt annað at gera, enn at halda á fram við stríðinum.

Sjálvur verður Heini tó ikki partur av øllum hesum. Sum vit skrivaðu í leygardagsútgávu okkara, so flytir Heini til Føroya um ársskiftið, og verður hann tí partur av liðnum hjá Neistanum í endaspælinum.

**-jm**

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 8 | 6 | - | 1 | - | 1 | 194 | 148 | 46 | 13 |
| 2 VB | 8 | 6 | - | 0 | - | 2 | 194 | 143 | 51 | 12 |
| 3 VÍF | 8 | 5 | - | 1 | - | 2 | 195 | 169 | 26 | 11 |
| 4 Neistin | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 211 | 186 | 25 | 9 |
| 5 StÍF | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 194 | 187 | 7 | 9 |
| 6 Søljan | 9 | 1 | - | 0 | - | 8 | 153 | 214 | -61 | 2 |
| 7 Kyndil | 9 | 1 | - | 0 | - | 8 | 142 | 236 | -94 | 2 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 211 | 194 | 17 | 11 |
| 2 Neistin | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 199 | 174 | 25 | 10 |
| 3 StÍF | 7 | 4 | - | 0 | - | 3 | 174 | 172 | 2 | 8 |
| 4 VÍF | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 184 | 170 | 14 | 7 |
| 5 H71 | 7 | 1 | - | 1 | - | 5 | 167 | 184 | -17 | 3 |
| 6 KÍF | 7 | 1 | - | 1 | - | 5 | 166 | 207 | -41 | 3 |